# Sáttmáli

# millum

# Ergoterapeutfelagið

# og

# Fíggjarmálaráðið

# 2020 - 2023

# Innihaldsyvirlit

**Innihaldsyvirlit** ... 2
**§ 1 Sáttmálaøki** ... 3
**§ 2 Samráðingarrættur** ... 3
**§ 3 Løn** ... 4
**§ 4 Viðbøtur og førleikaviðbøtur** ... 4
**§ 5 Starvsaldur** ... 4
**§ 6 Lønútgjalding** ... 4
**§ 7 Eftirløn** ... 4
**§ 8 Fyribilstænasta í hægri starvi** ... 4
**§ 9 Tænastubúni** ... 4
**§ 10 Arbeiðstíð** ... 5
**§ 11 Tilkallivakt (Vakt)** ... 8
**§ 12 Broyting í arbeiðsgongd v.m.** ... 10
**§ 13 Setanarbræv** ... 10
**§ 14 Sjúka** ... 10
**§ 15 Frítíð** ... 10
**§ 16 Barnsferð** ... 11
**§ 17 Eftirsitiløn** ... 11
**§ 18 Skeið** ... 11
**§ 19 Farloyvi** ... 11
**§ 20 Uppsøgn** ... 12
**Tímaløntir ergoterapeutar (§§ 21 – 23)** ... 12
**§ 21 Tímaløn** ... 12
**§ 22 Starvsaldur** ... 12
**§ 23 Arbeiðstíð** ... 13
**§ 24 Uppsøgn, sjúka, frítíð o.a.** ... 13
**§ 25 Ferðaútreiðslur** ... 13
**§ 26 Frálæra v.m.** ... 14
**§ 27 Álitisfólkaskipan** ... 14
**§ 28 Samstarvsráð** ... 15
**§ 29 Gildi og Uppsøgn** ... 15
**Avtala um tiltøk, ið kunnu stuðla undir ein virknan starvsfólkapolitikk á landsins stovnum.** ... 16
**Avtala um strategiska og skipaða førleikamenning á stovnum landsins** ... 20
**Avtala um serstaka fríviku** ... 21
**Protokollat nr. 2 viðvíkjandi skeiði** ... 22
**Protokollat nr. 3 viðvíkjandi bústaði** ... 22
**Protokollat nr. 4 viðvíkjandi nýtslu av egnum akfari í sambandi við tilkallivakt** ... 23
**Protokollat nr. 5 viðvíkjandi kvalifikatiónskrøvum** ... 23
**Protokollat nr 6** ... 24
**Protokollat** ... 24

**§ 1 Sáttmálaøki**
Hesin sáttmálin er galdandi fyri ergoterapeutar, sum arbeiða innan Almanna- og Heilsumálaráðið og á stovnum undir landinum.
*Stk. 2.* Sum ergoterapeutur er at rokna tann, sum er góðkendur sum slíkur sambært "Lov om terapiassistenter" frá 8. mai 1968, broytt við lóg nr. 217 frá 23. apríl 1986.
*Stk. 3.* Starvsheiti á sáttmálaøkinum. Ergoterapeutar kunnu setast í starv sum:
1) Ergoterapeutur, t.e, ergoterapeutur, sum á stovni ella heima hjá sjúklingi veitir ergoterapeutiska viðgerð, ráðgeving og leiðbeining. Umframt hetta verður eisini útint arbeiði, ið fevnir um málsviðgerð av hjálpartólum og húsabroytingum. Hesi hava eina skálagongd frá 1. januar 2021 sum er: 1, 3, 5, 9 og 15. Tann 1. oktober 2022 er skálagongdin 1, 3, 5, 9 og 17.
2) Leiðandi ergoterapeutur, ið hevur ábyrgdina av leiðsluni og av at leggja til rættis arbeiðið hjá ergoterapeutum og/ella øðrum bólkum, hava eina skálagongd galdandi frá 1. januar 2022 sum er frá stig 28 til stig 35.
3) Leiðandi ergoterapeutur á Landssjúkrahúsinum er á stig 33
4) Varaleiðarin á Landssjúkrahúsinum er á stig 28
5) Leiðandi terapeutur á Psykiatriskadeplinum er á stig 30
6) Leiðandi terapeutur á Klaksvíkar- og Suðuroyar sjúkrahúsum eru á stig 30
7) Stovnsleiðari er á stig 35
8) Ergoterapeutur, sum arbeiðir einsamallur og ikki sum leiðandi ergoterapeutur hevur rætt til árliga viðbót kr. 12. 000,-.
5) Lesandi, ið hevur staðið 4. semestur, fær 85% av byrjanarløn hjá ergoterapeuti, nevndur í § 1, stk. 3, 1).
6) Konsulentviðbót, er kr. 341,02 um tíman.
7) Terapeutar, ið undirvísa á Heilsuskúlanum skulu flokkast á stig 19 galdandi frá 1. oktober 2021. Afturat hesi flokking, skulu tey hava eina viðbót- um tey hava ella tá ið tey hava fingið pedagogikum á kr. 2591,-.
8) Tá søkt verður eftir stuðulsfólki og kravt verður, at starvsfólkið hevur útbúgving sum ergoterapeutur, skal viðkomandi eisini hava løn sum ergoterapeutur og hava starvsaldur eftir vanligum treytum.
Um annað starvsfólk røkir starv, sum ætlað er ergoterapeuti, skal hetta starv lýsast leyst hvørt ár, um onnur avtala ikki verður gjørd við Ergoterapeutfelagið. Um persónur úr øðrum fakbólki verður settur í hetta starv, skal fráboðan latast hesum persóni um, at starvið er fyribils.

**§ 2 Samráðingarrættur**
Samráðingarrættin hevur Ergoterapeutfelagið sum ger sáttmála við Fíggjarmálaráðið.
Fíggjarmálaráðið ásannar, at felagið hevur samráðingarrættin viðvíkjandi øllum fakligum viðurskiftum hjá limunum.
*Stk. 2.* Verður ósemja um, hvussu hesin sáttmáli skal skiljast, skal ósemjan leggjast fyri gerðarrætt, sum ger bindandi úrskurð í trætuni.
Gerðarættarlimirnir verða valdir soleiðis:
Ergoterapeutfelagið velur tveir limir. Fíggjarmálaráðið velur tveir limir. Hesir báðir partarnir velja í felag fimta limin, sum skal vera ástøðumaður. Verður ikki semja um ástøðumannin, verður hann tilnevndur av sorinskrivaranum.

**§ 3 Løn**
Starvsfólk, sum nevnt er í § 1, verður lønt eftir galdandi lønartalvu fyri Ergoterapeutarfelagið og ganga tvey ár á hvørjum lønarstigi.

**§ 4 Viðbøtur og førleikaviðbøtur**
Førleikaviðbót latast fyri eftirútbúgving. Hesar viðbøtir eru førleikaviðbøtur og eru knýttar at starvinum. Fyri at kunna fáa førleikaviðbót, skal eftirútbúgvingin verða kravd og verða frá góðkendum útbúgvingarstað. Sjálvt um ergoterapeuturin hevur tikið meira enn eina eftirútbúgving, so verður bert ein viðbót latin. Er starvið parttíðarstarv verður viðbótin samsvarandi setanarbrøkinum.

Eftirútbúgving 120 tímar: 750,-kr.
Eftirútbúgving 160 tímar: 1000,-kr.
Eftirútbúgving 200 tímar: 1250,-kr.

Ergoterapeutur, sum hevur lokið prógv sum praktikvegleiðari, fær kr. 1.250 um mánaðin í viðbót tað tíðarskeiðið, hon virkar sum praktikvegleiðari. Er sum undantak neyðugt at nýta praktikvegleiðarar, sum ikki hevur lokið prógv, er viðbótin kr.750 um mánaðin.
Er starvið parttíðarstarv verður viðbótin samsvarandi setanarbrøkinum.

**§ 5 Starvsaldur**
Lønin hjá ergoterapeuti verður ásett eftir, hvussu leingi viðkomandi hevur arbeitt sum mánaðarløntur ergoterapeutur ella hevur verið í eftirútbúgving innan tey øki, sum hesin sáttmáli fevnir um.
*Stk. 2.* Hevur ergoterapeutur arbeitt í útlondum ella innan øki, har ið hesin sáttmáli ikki er galdandi, skal starvsfólkið saman við nevnd í Ergoterapeutfelagnum og setanarmyndugleikanum áseta lønarstigið. Í slíkum førum skal avgerðin takast eftir tí, sum starvsfólkið hevur arbeitt við, og teimum royndum, sum starvsfólkið hevur innan hetta sáttmálaøkið.
*Stk. 3.* Tá ið ergoterapeutur fer úr starvi, skal arbeiðsgevarin lata starvsfólkinum váttan fyri starvsaldur, og starvsfólkið skal vísa hesa váttan, tá ið byrjað verður á nýggjum arbeiðsplássi.

**§ 6 Lønútgjalding**
Lønin verður útgoldin eina ferð um mánaðin afturút umleið 25. í hvørjum mánaði. Viðlagdur skal vera seðil, har tilskilað er, hvat lønin er fyri. Samstundis sum lønin verður útgoldin, avgreiðir stovnurin/arbeiðsplássið eftirlønargjaldið.

**§ 7 Eftirløn**
Arbeiðsgevarin rindar fyri starvsfólkið 15 % í eftirlønargjaldð í felags (kollektiva) eftirlønarskipan, sum sáttmálapartarnir í serstakari avtalu eru samdir um.

**§ 8 Fyribilstænasta í hægri starvi**
Ergoterapeutar, sum fyribils røkja hægri starv í minst eina viku, eiga í hesum tíðarskeiði somu løn, sum teir høvdu fingið, um teir vóru settir í hetta hægra starvið.

**§ 9 Tænastubúni**
Ergoterapeutur fær frían tænastubúna. Í størvum, har ið hetta ikki ber til, ella har ið starvsfólk av viðgerðarávum verða biðin um at nýta síni egnu klæðir, verður latin árlig viðbót 1.920,00 kr. Er frítt

vask á arbeiðsstaðnum verður latin árlig viðbót 840,00 kr. Henda upphædd er galdandi óansæð lønarbrøk.

**§ 10 Arbeiðstíð**

*Stk. 1:* Vanlig arbeiðstíð;

a) Vanliga arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna, íroknað tilkallivakt sambært § 11, stk. 3 og 4. Um so er, at Fíggjarmálaráðið ger avtalu við onnur føroysk feløg um at seta vikutímatalið niður, verður vikutímatalið í hesum sáttmála lækkað samsvarandi.

b) Dagliga arbeiðstíðin verður fastløgd millum 7 og 8½ tíma. Tó eru møguleikar at gera avtalu um frávik, um arbeiðsgongdin á starvsstaðnum krevur tað. Henda avtala verður gjørd millum álitisumboðið/Ergoterapeutfelagið og starvsstaðið/leiðsluna.

d) Arbeiðstíð út um fastløgdu dagligu arbeiðstíðina verður roknað sum yvirtíð. Matarfrí, sum ásett er frammanundan, verður ikki íroknað arbeiðstíðina. Ber ikki til at leggja matartíðina fasta, verður henda roknað sum arbeiðstíð og skal tá haldast, tá ið arbeiðsgongdin loyvir tí. Henda fríløtan skal vera styttri enn ½ tíma, og ergoterapeuturin má tá vera til reiðar at møta til arbeiðis, um boð verða eftir honum.

<u>2. Kvøld- og náttarvakt.</u>

Fyri hvørjar 40 tímar í kvøld- ella náttarvakt eigur ergoterapeuturin frí í 3 tímar.

Sum kvøld- ella náttarvakt verður roknað arbeiði, sum er byrjað kl. 14 ella seinni, og sum endar seinni enn kl. 17. Hesar reglur galda fyri allar yrka-, sunnu- og halgidagar, men ikki fyri yvirtíð, tilkalli- og samdøgurvaktir.

Vunnin frítíð skal samsýnast við heilum arbeiðsfrídøgum, t.e. dagar, ið annars áttu at verið arbeiðsdagar.

Tá ið ergoterpeuturin fær arbeiðsfríar dagar, skal tann vunna frítíðin styttast við tí tímatali, sum viðkomandi annars skuldi arbeitt eftir tænastuætlanini.

Henda regla umfatar ikki tímalønt, av tí at tey fáa fulla samsýning í tímaløn fyri kvøld- og náttararbeiði.

<u>3. Tænastuætlan.</u>

Tænastuætlan fyri arbeiðstíð verður kunngjørd soleiðis, at ergoterapeutar altíð vita, nær arbeiðstíðin er, og teir skulu vita 4 vikur frammanundan, nær teir hava frí. Hetta er tó ikki galdandi fyri leysar avloysarar.

Broyting í tænastulista kann bert gerast í serstøkum førum (t.d. um starvsfólk eru sjúk) og í samráð við starvsfólkini.

Verður neyðugt at broyta ætlaða frígongu av vunnari frítíð minni enn 72 tímar frammanundan byrjan av síðstu tænastu fyri frítíðina, skal vunna tímatalið niðurskrivast við sama tali tímum, og frítíðin kortini roknast sum hildin. Hesir arbeiðstímar skulu samsýnast annað hvørt sum yvirtíð sambært stk. 2 ella sum boðsending uttan at hava tilkallivakt sambært stk. 6. Viðbótin fyri broytta tíð sambært stk. 1, nr. 4 verður ikki latin í hesum sambandi.

Kunngerð um frídagar orsakað av serligum arbeiði, so sum yvirtíð, sunnu- og halgidagsarbeiði, boðsending í tilkallivakt v.m. skal vera givin í seinasta lagi 72 tímar frammanundan, at byrjað verður við arbeiðinum, sum liggur beint áðrenn byrjað verður upp á frídagar.

<u>4. Umlagdir tímar.</u>

Um tænastulistin verður broyttur hjá ergoterapeuti (leysir avloysarar undantiknir), skal hetta fráboðast í minsta lagi 72 tímar frammanundan. Verður henda freistin ikki hildin, fær ergoterapeuturin 19,00 kr. um tíman sum viðbót fyri broyttu tíðina. Frá 1.10.2004 er viðbótin 20,75 kr. um tíman. Broytt tíð er at skilja sum tíð, tá ið ergoterapeuturin ikki skuldi verið til arbeiðis, men sum eftir broytingina verður vanlig arbeiðstíð.

*Stk. 2.* Yvirtíð.
Yvirtíðararbeiði skal, alt tað ber til, samsýnast við frítíð, sum skal vera eins long og yvirtíðin og við viðbót uppá 50% rundað uppeftir til heilar tímar. Er yvirtíðararbeiði ikki samsýnt við frítíð, tá ið triði mánaðurin er lokin frá tí, at yvirtíðararbeiðið er útint, verður løn goldin fyri yvirtíðararbeiðið eftir reglunum, sum í sáttmálanum eru galdandi viðvíkjandi yvirtíðarsamsýning, t.e. tímaløn + 50%. Verður ergoterapeutur settur at arbeiða yvir, skal hetta fráboðast í arbeiðstíðini dagin fyri. Verður ikki fráboðað rættstundis, fær ergoterapeuturin umframt yvirtíðarløn eina viðbót uppá 21,00 kr. um yvirtíðararbeiðið varir meira enn ein tíma. Frá 1.10.2004 er viðbótin 23 kr.

*Stk. 3.* Parttíðarstarvandi.
Parttíðarstarvandi, sum arbeiða meira enn tað tímatal, sum avtalað er, og tað ikki verður roknað sum yvirtíðararbeiði, verða samsýnt í sama mun við frítíð. Hava tey ikki fingið hesa frítíð, tá ið 3 mánaðir eru farnir frá tí, at arbeiðið varð gjørt, fáa tey vanliga tímaløn uttan viðbót. Í teimum førum, har ikki ber til at fríganga, kann starvsstaðið og álitisumboðið hjá einum bólki av ergoterapeutum gera avtalu um, at peningurin kann útgjaldast, áðrenn omanfyri nevnda tíðarskeið er lokið. Ergoterapeutur, sum arbeiðir parttíð, hevur ikki rætt til yvirtíð, fyrr enn farið verður út um vanligu arbeiðstíðina á starvsstaðnum. Tá parttíðarstarvandi verður settur at gera meira arbeiði enn upprunaliga avtalað, skal hann hava boð um tað dagin fyri. Verður ikki boðað frá rættstundis, skal hann, umframt yvirtíðarløn, hava eina viðbót uppá 21 kr., varir hetta arbeiðið meira enn ein tíma. Frá 1.10.2004 er viðbótin 23 kr.

*Stk. 4.* Frísamdøgur.
Ergoterapeutar hava rætt til eitt frísamdøgur um vikuna, og henda dag kann heldur ikki verða álagt teimum tilkallivakt sambært § 11.

1) Arbeiðstíðin verður løgd eftir hesum reglum:

a) Frísamdøgrið í vikuni skal vera minst 64 tímar út í eitt. Tó verður tað roknað sum givið frísamdøgur, um frítíðin hevur verið millum 55 og 64 tímar.
b) Tá ið viðurskiftini gera, at frísamdøgrið í vikuni ikki kann hava ta longd, sum ásett er undir a), kunnu í staðin fyri verða veitt tvey frísamdøgur. Hesi frísamdøgur skulu vera minst 35 - 40 tímar til longdar.
c) Verða tvey ella fleiri frísamdøgur við longd sum undir a) løgd saman, skal tað fyrsta lúka treytirnar undir a), og hini skulu vera í minsta lagi 48 tímar til longdar.
d) Verður eitt frísamdøgur við longd sum undir a) lagt saman við frísamdøgrum sum undir b), skal tað fyrsta frísamdøgrið lúka krøvini undir a), og hini skulu vera í minsta lagi 24 tímar til longdar.
e) Verða tvey ella fleiri frísamdøgur við longd sum undir b) samanløgd, skulu tvey tey fyrstu tilsamans hava longd sum nevnt undir a), og hini skulu vera í minsta lagi 24 tímar til longdar.

2) Verður neyðugt at broyta frítíðina, sum hoyrir til vikufrísamdøgrið ella annað frísamdøgur, sum er 24 tímar ella meira til longdar, hjá fulltíðarstarvssettum og parttíðarstarvssettum verður arbeiðstíðin samsýnt eftir yvirtíðarreglum, sambært stk. 2, tó fyri minst 6 tímar.

3) Verður eitt frísamdøgur av serligum orsøkum tikið aftur, verður so skjótt sum til ber sum samsýning givið annað frísamdøgur og eitt ískoyti í tíð svarandi til 50% av tí arbeiði, sum gjørt var hetta frísamdøgur, rundað upp til heilar tímar. Samlaða endurgjaldið verður tó í minsta lagi fyri 6 yvirtímar ella 9 tímar til frígongu.

*Stk. 5.* Frídagar.

1) Sum fastir frídagar eru at rokna:

Nýggjársaftan
Nýggjársdagur
Skírisdagur
Langifríggjadagur
Páskaaftan
2. páskadagur
Flaggdagur
Dýribiðidagur
Kristi Himmalferðadagur
Hvítusunnuaftan
2. hvítusunnudagur
Ólavsøkudagur
Jólaaftan
1. jóladagur
2. jóladagur.

Sum hálvir frídagar eru at rokna:

Grundlógardagur aftaná kl. 12.
Ólavsøkuaftan aftaná kl. 12.

Ergoterapeutar hava rætt til frí teir hálvu ella føstu frídagarnar, ella rætt til endurgjald svarandi til frí á annan hátt. Frí verður givið á annan hátt í hesum førum:

a) Vanligt arbeiði ella tilkallivakt fastar ella hálvar frídagar.
b) Tá ið vikufrísamdøgrið ella onnur frítíð, sambært stk. 4, nr. 2 fellur fastar ella hálvar frídagar.

Men **<u>ikki</u>** í hesum førum:

1. Tá ið fastur ella hálvur frídagur fellur vikudag, sum ergoterapeuturin altíð hevur frí.
2. Parttíðarstarvandi, sum hava fasta arbeiðstíð, og dagurin fellur ein dag, tey kortini hava tíðarásett vikufrísamdøgur.

2) Frítíðin skal vera sum ásett undir stk. 4, nr. 1, b) ella e). Er henda frítíð ikki givin, tá ið 3. mánaðurin er lokin frá tí, at arbeitt varð fastan frídag, verður endurgjald veitt í peningi sambært reglunum í stk. 2 um yvirtíð, tó í minsta lagi fyri 6 tíma arbeiði. Starvsstaðið og álisitfólkið/Ergoterapeutfelagið kunnu tó gera avtalu um, at samsýningin verður veitt fyrr enn annars, um ikki ber til at fríganga.

*Stk. 6.* Yvirtíð uttan vakt. (Uppkall).

Tey, sum verða sett til arbeiðis uttan fyri vanligu arbeiðstíðina, uttan at teimum er álagt tilkallivakt sambært § 11, fáa løn sum fyri yvirtíð sambært stk. 2, nr. 1, tó í minsta lagi fyri 3 tímar. Fyri arbeiði meira enn 3 tímar verður goldið yvirtíð fyri hvønn byrjaðan tíma. Verður ergoterapeutur biðin til arbeiðis fleiri ferðir innan fyri 3 tímar, fær hann tó bert løn fyri 3 yvirtímar. Fyri arbeiði út um 3 tímar, verður yvirtíðargjald latið fyri hvønn byrjaðan tíma. Verður ergoterapeutur biðin til arbeiðis í tíðarskeiði sambært stk. 4, verður lønt eftir hesum reglum: Fleiri uppkall innan fyri 6 tímar frá 1. uppkalli at rokna, verða roknað undir somu tíð. Verður næsta uppkall meira enn 6 tímar aftaná 1. uppkall, verður samsýningin sambært fyrra stk.

*Stk. 7.* Samsýning fyri sunnudagar og fastar frídagar.
Fyri sunnudagsarbeiði og arbeiði teir hálvu og føstu frídagarnar, sum ikki eru sunnudagar, verður latin eyka samsýning 50% fyri hvønn tíma arbeitt er. Arbeiði teir føstu frídagarnar, sum nevndir eru í stk. 5, verður samsýnt við 50% eyka av teirri arbeiðstíð, sum arbeitt er fastan frídag. Er endurgjaldsfrítíð ikki givin, tá ið 3. mánaðurin er lokin frá tí, at arbeitt varð sunnudag, hálvan ella fastan frídag, verður latið endurgjald svarandi til 50% av tímalønini í dagtænastu sambært § 21. Starvsstaðið og álitisfólkið/Ergoterapeutfelagið kunnu tó gera avtalu um, at samsýningin verður veitt fyrr enn annars, um ikki ber til at fríganga. Samsýning verður veitt fyri hálvar tímar.
Nevnda samsýning verður eisini givin fyri yvirtímar sambært stk. 2, um arbeitt verður nevndu dagar. Fulltíðarstarvandi (undantiknir eru ergoterapeutar, ið eru settir til sunnudagstænastu), sum í einum ársfjórðingi (januar-mars, apríl-juni, juli-september og oktober-desember) verða áløgd at arbeiða meira enn seks sunnudagar, fáa eyka samsýning fyri hesar sunnudagar, svarandi til helvtina av vanligu eykasamsýningini, sambært stk. 1.

*Stk. 8.* Ótíðarviðbøtur (stk. 8, 9 og 10).
1) Fyri arbeiði leygardag millum kl. 12.00 og 24.00 og mánadag frá 00.00 til náttarvaktin endar, verður fyri hvønn tíma goldin eykasamsýning sambært avtalu um vaktargjøld o.a. Samsýningin verður eisini latin fyri yvirtíðartímar sambært stk. 2 sum falla innan fyri nevndu tíðarbil. Viðbótin verður roknað í heilum tímum.

*Stk. 9.* Ergoterapeutar, sum arbeiða í kvøld- og náttarvakt, fáa eykasamsýning fyri hvønn tíma sambært avtalu um vaktargjøld o.a. Henda upphæddin verður eisini latin fyri yvirtíðartímar sambært stk. 2 og arbeiði í tilkallivakt, sum fella í sama tíðarbili. Ergoterapeutar, sum í einum ársfjórðingi (januar-mars, apríl-juni, juli-september, oktober-desember) hava meira enn 31 kvøld- og/ella náttarvaktir, fáa fyri hesi meirarbeiði millum kl. 17.00 og 06.00 eina eykaviðbót aftrat, sum svarar til helvtina av eykasamsýningini, sambært stk. 8, 1). Henda regla er tó ikki galdandi fyri tey, sum bert eru sett til kvøld- og/ella náttarvaktir.

*Stk. 10.* Allar viðbøtur verða eisini veittar í frítíðarskeiðnum, undir sjúku og barnsburði.

*Stk. 11.* Verður arbeitt 2 tímar ella meira út um vanliga arbeiðstíð, hevur ergoterapeutur rætt til ½ tíma matsteðg uttan lønarmiss.

**§ 11 Tilkallivakt (Vakt)**
*Stk. 1.* Slag av vakt. Ergoterapeuti kann verða álagt hesi sløg av tilkallivakt:

I) Tilkallivakt heimanífrá.
II) Tilkallivakt úr vaktarrúmi.

Ergoterapeutar skulu møta beinanvegin, sum teir eru boðsendir. Frammanundan tilkallivakt skal ergoterapeutur hava vanligan arbeiðsdag (undantikið samdøgursvakt). Er talan um vakt I (heimanífrá) metir starvsstaðið, um flutningstíðin til arbeiðsstaðið er ov long. Um so er, má starvsstaðið meta, um vaktin skal broytast til vakt II (vaktarrúm) ella geva samsýning fyri nýtslu av egnum akfari ella fyri hýruvogn. Hetta umfatar eisini flutning til hús aftur.
Vaktarrúmið skal lúka ávís minstukrøv:
Vaktarrúmið skal hava sovi-, lesi- og skrivipláss umframt skápspláss. Í rúminum skal vera telefon, og atgongd skal vera til bað og toilett, tekøk og kuldaskáp. Rúmið skal kunna læsast og má ikki verða nýtt til annað endamál um dagin.

*Stk. 2.* Slag av vakt. Ergoterapeuti kann eisini verða álagt tilkallivakt sum nevnt í stk. 1 í eitt samdøgur (samdøgursvakt) teir dagar, sum ikki eru heilir arbeiðsdagar (helst sunnu- og halgidagar). Samdøgursvakt verður roknað til tað samdøgrið, har flestu tímarnir í samdøgrinum falla.

*Stk. 3.* Virðið av vakt. Tilkallivakt (tó ikki samdøgursvakt sambært stk. 4 er partur av vanligu vikuarbeiðstíðini, sambært § 10, stk. 1 a, við hesum virðum:

Vakt I: 1/3 tíma
Vakt II: 3/4 tíma.

*Stk. 4.* Samdøgursvakt. Samdøgursvakt er partur av vanligu vikuarbeiðstíðini sambært § 10, stk. 1 a) við hesum virðum:

Vakt I: 14 tímar
Vakt II: 20 tímar.

Tilkallivakt verður innroknað í vikutímatalið (40 tímar). Starvsstaðið eigur sostatt at bera so í bandi, at starvsfólkaskipanin er so, at vikutímatalið ikki fer upp um 40 tímar orsakað av, at arbeitt verður við tilkallivakt. Annars verður tilkallivaktin roknað sum yvirtíð. Verður nøkrum álagt eyka tilkallivakt, verða tímarnir umroknaðir til vanligar tímar og útgoldnir sum yvirtíð sambært § 10, stk. 2.

*Stk. 5.* Broyting av vakt. Verður neyðugt at gera frávik í arbeiðstíðini frá tí, sum upprunaliga er avtalað, skulu ergoterapeutar (tó ikki leysir avloysarar) hava boð um hetta í minsta lagi 72 tímar frammanundan. Verður henda freistin ikki hildin, verður fyri hvønn tíma, ið ergoterapeutur er til taks - íroknaðir tímar, ið arbeitt verður - veitt viðbót svarandi til helvtina av viðbótunum, ið nevndar eru í § 10, stk. 1, nr. 4.

*Stk. 6.* Boðsending.
(Boðsending merkir: boðsending og tænasta veitt um telefon).
Fyri ta tíð, roknað frá boðsending, tá ið arbeitt verður í tilkallivakt (samdøgursvakt undantikin sambært stk. 7), verður samsýnt við frí sum fyri yvirtíðararbeiði ella við yvirtíðarløn sambært § 10, stk. 2, minkað við teimum virðum, sum nevnd eru í § 11, stk. 3. Haraftrat galda ásetingarnar í § 10, stk. 7-9.
Hvør boðsending telur minst 1 tíma. Boðsending verður lønt fyri hvønn byrjaðan tíma, ið arbeitt verður. Fyri fleiri boðsendingar innan fyri sama tíma verður tó bert samsýnt við frí við yvirtíð ella yvirtíðarløn fyri ein tíma. Boðsendingin er at rokna frá tí, at boðini verða send, og til ergoterapeut-urin er við hús aftur.
Samsýningin fyri boðsendingina er yvirtíðargjald umframt galdandi viðbøtur. Verður boðsendingin avroknað sum frídagar (tímar), verður hvør boðsendingartími niðurskrivaður við 1/3 tíma (vakt I) ella 3/4 tíma (vakt II). Verður boðsendingin avroknað við útgjalding, verður galdandi tímaløn (roknað sum í § 21 um tímaløn í dagtænastu) niðurskrivað við 1/3 tíma (vakt I) og 3/4 tíma (vakt II).

*Stk. 7.* Samdøgursvaktir. Fyri samdøgursvaktir sambært stk. 2 galda hesar reglur:

1) Fyri teir fyrstu 8 tímarnar, ið arbeitt verður, verður ikki veitt eyka frítíð ella løn.
2) Fyri arbeiði í meira enn 8 tímar verður veitt frítíð sum fyri yvirtíðararbeiði ella yvirtíðarløn sambært § 10, stk. 2.
3) Ásetingarnar í § 10, stk. 7-9 galda fyri boðsendingar sambært 1) og 2).
4) Arbeiði í samdøgursvaktum verður uppgjørt sum nevnt í stk. 6, 2).

Í samband við samdøgursvakt í sunnu-/halgisamdøgrinum v.m. verður altíð latin sunnudags- ella halgidagsviðbót fyri 8 tímar.

*Stk. 8.* Hvíld aftaná vakt. Tá ið tænastuætlanin, sambært § 10, stk. 1, 3), verður gjørd, verður miðað eftir, at ergoterapeutur ikki beint eftir tilkallivakt verður settur til vanligt arbeiði, hvørki dagarbeiði ella samdøgursvakt. Verður kortini álagt ergoterapeutinum at hava vanligt dagarbeiði ella samdøgursvakt beint eftir tilkallivakt, og hann ikki hevur havt hvíld í tilkallivaktini, sum svarar til minst helvtina av tilkallivaktartíðini (fyri samdøgursvakt tó 11 tímar), harav minst 4 tímar skulu falla millum kl. 23.00 og byrjan av komandi tænastu, skal hann ikki byrja dagarbeiði, samdøgursvakt ella frígongu, fyrr enn hann hevur fingið 8 tíma hvíld út í eitt roknað frá seinastu boðsending í vaktartíðini.

**§ 12 Broyting í arbeiðsgongd v.m.**
Tá ið avgerandi broytingar verða gjørdar í arbeiðsgongdini, ella nýggj tøkni verður tikin í nýtslu, skal starvsfólkið fáa boð um hetta í góðari tíð fyri at fáa høvi til at vera við í tilrættisleggingini. Krevja slík tiltøk eftirútbúgving, skal starvsfólkið hava høvi til at fáa ta neyðugu eftirútbúgvingina, so tey kunnu røkja hetta arbeiði.

**§ 13 Setanarbræv**
Tá ið starv sum ergoterapeutur er leyst, skal tað lýsast í "Ergoterapeutforeningen" og í føroyskum bløðum. Tilskilast skulu starvsstað og starvsøki. Sama er galdandi, tá ið lýst verður eftir vikarum og leysum avloysarum.

*Stk. 2.* Mánaðarlønt fáa fyri setanina setanarbræv, har ið starvsstað og deild eru tilskilað. Er talan um setan í fasta arbeiðstíð (t.d. kvøld- ella náttarvakt), eigur hetta at vera viðmerkt í setanarbrævinum. Harumframt eiga parttíðarsett at hava tilskilað fasta arbeiðstíð.

**§ 14 Sjúka**
Ergoterapeutar fáa løn undir sjúku sambært løgtingslóg nr. 13 frá 1. juli 1958 um starvsmenn.
*Stk. 2.* Um starvsfólk sjúkrameldar seg á frígongdudegi, skal dagurin roknast sum frígingin. Um starvsfólk sjúkrameldar seg áðrenn frígongudagurin er byrjaður, verður tíðin at rokna sum sjúkradagur.
*Stk. 3.* Verður barn hjá ergoterapeuti sjúkt, hevur starvsfólkið í samband við sjúkuna rætt til frí við løn fyrsta sjúkradag barnsins.

**§ 15 Frítíð**
Ergoterapeutar fáa frítíð og frítíðarløn sambært løgtingslóg nr. 30 frá 1. apríl 1986 um frítíð við løn við seinni broytingum.
*Stk. 2.* Starvsfólk eiga rætt til serstakt frítíðargjald, svarandi til 1,5% av allari føstu árslønini og 12% av øllum útgoldnum viðbótum og úrtíðarløn í undanfarna innvinningarári.
Hesi gjøld verða at gjalda í seinasta lagi, tá ið frítíðin byrjar. Nevnda 1,5% frítíðargjald verður ikki goldið, tá ið farið verður úr starvi, men í staðin verður frítíðargjald 12% goldið av allari lønini undanfarna innvinningarár.
*Stk. 3.* Parttíðarstarvandi, sum arbeiða meira enn tað, sum avtalað er, og hetta ikki verður roknað sum yvirtíðararbeiði, fáa fyri hetta arbeiði 12% í frítíðarløn. Hetta er eisini galdandi, tá ið farið verður úr starvi.
*Stk. 4.* Tá ið ergoterapeutur verður settur í starv seinast 1 mánað eftir lokna næmingatíð, verður veitt frítíð við løn eftir reglunum, sum ásettar eru fyri starvið.

*Stk. 5.* Sjúkradagar í frítíð verða vanliga viðroknaðir sum frítíðardagar. Tó kunnu eftir umsókn í serligum førum, har sjúkan forðar fyri nýtslu av frítíðini á rímiligan hátt, slíkir sjúkradagar koma undir reglurnar fyri sjúku, og nýggir frítíðardagar verða tá givnir. Um starvsfólkið er óarbeiðsført, tá frítíðin byrjar, verða tó altíð latnir eyka frídagar. Somu reglur verða galdandi í sambandi við sjúku undir frígongu.

**§ 16 Barnsferð**

Starvskvinna, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir fyri metta føðing.
Stk. 2. Starvskvinna, ið er við barn, hevur rætt til barsilsfarloyvi av viðgonguog barnsburði. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, kann starvskvinnan fara úr arbeiði við løn fram til føðing. Eftir føðing fær starvskvinnan farloyvi við løn í 24 vikur.
Barsilsfarloyvið við løn kann soleiðis vera bæði styttri og longri enn 28 vikur tilsamans, men eftir føðing eru altíð 24 vikur við løn.
Stk. 3. Prógvar starvskvinnan við læknaváttan, at hon er óarbeiðsfør meir enn 4 vikur undan mettari føðing, verður hetta roknað sum vanlig sjúka, og starvskvinnan hevur tá rætt til løn undir sjúku. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, verður farið frá løn undir sjúku til barsilsfarloyvi við løn, sbr. stk. 2.
Stk. 4. Umframt nevndu sømdir kann starvskvinna fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, um hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.
Stk. 5. Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín.
Stk. 6. Starvsfólk, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp til 4 vikur áðrenn, tey fáa barnið, og í 24 vikur tilsamans. Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín. Rætturin til fráveru við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur gjørt av, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í samband við, at tey fáa barnið. Foreldrini kunnu ikki vera í farloyvi við løn samstundis eftir hesi grein.
Stk. 7. Umframt farloyvi nevnt í stk. 2-6, hava starvsfólk rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur soleiðis, at samlaða farloyvistíðarskeiðið tilsamans er 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið. Tíðarskeiðini eru samanhangandi, og farloyvi eftir hesi grein skal vera avgreitt í seinasta lagi 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið.

**§ 17 Eftirsitiløn**

Doyr ergoterapeutur, sum er løntur eftir hesum sáttmála, meðan hann er í starvi, eigur eftirsitandi hjúnafelagi ella børn undir 18 ár, sum ergoterapeuturin hevur skyldu at uppihalda, rætt til løn í mun til uppsagnartíðina, tó í minsta lagi 3 mánaðir.
*Stk. 2.* Eftirsitiløn er tann løn, sum ergoterapeuturin hevði deyðsdagin. Lønin í mánaðinum, tá ið ergoterapeuturin doyr, verður ikki roknað upp í eftirsitilønina, men verður goldin teimum, sum hava rætt til hesa eftir stk. 1.

**§ 18 Skeið**

Um skeið til frama fyri arbeiðsstaðið fellur á leygardag, sunnudag ella fastan frídag, verður veitt frígonga fyri hesar dagar.

**§ 19 Farloyvi**

Ergoterapeutar kunnu fáa farloyvi uttan løn, um tað ikki nervar arbeiðsgongdina á stovninum.
*Stk. 2.* Farloyvi kann verða játtað í mesta lagi í 5 ár. Setanarmyndugleikarnir hava skyldu at hava starv leyst, tá ið farloyvistíðin er úti.
*Stk. 3.* Fær ergoterapeutur farloyvi í sambandi við útbúgving, ið tænir áhugamálum stovnsins, kann ergoterapeuturin fáa frí við løn við eftirlønargjaldi.

**§ 20 Uppsøgn**

Uppsagnarfreistin er frá báðum pørtum sambært løgtingslóg nr. 13 frá 1. juli 1958 um starvsmenn.

*Stk. 2.* Verður talan um at siga ergoterapeuti úr starvi, hava setanarmyndugleikarnir skyldu at geva Ergoterapeutfelagnum skrivlig boð við grundgeving fyri uppsøgnini.

*Stk. 3.* Til endaliga reglugerðin fyri virkið hjá samstarvsráðnum er samtykt (sí semju frá 16. februar 1993), verður hendan regla galdandi í samband við uppsøgn: Yrkisfelagið skal hava boð um uppsøgnina við nágreiniligari grundgeving, og verður uppsøgnin ikki givin, fyrr enn yrkisfelagið innan 2 vikur hevur ummælt uppsøgnina.

*Stk. 4.* Metir Ergoterapeutfelagið uppsøgnina at vera ógrundaða, kann felagið innan ein mánað eftir uppsøgnina krevja fund við tann uppsagda ergoterapeutin, setanarmyndugleikarnar og felagið.

*Stk. 5.* Fæst ikki semja á fundinum, kann málið innan ein mánað verða viðgjørt í eini uppsagnarnevnd, har Ergotrapeutfelagið og Fíggjarmálaráðið/Almanna- og Heilsumálaráðið velja 2 limir hvør, og í felag velja tey tann 5. limin: ástøðumannin. Fæst ikki semja um 5. limin, skal Sorinskrivarin velja hann. Nevndin skipar sjálv sín arbeiðshátt. Uppsagnarnevndin kann avhoyra partarnar og vitni.

*Stk. 6.* Nevndin ger ein úrskurð í seinasta lagi ein mánað eftir, at málið er lagt fyri nevndina. Úrskurðurin skal sendast Fíggjarmálaráðnum/Almanna- og Heilsumálaráðnum og Ergoterapeutfelagnum. Um ergoterapeuturin ella starvsstaðið ikki ynskir framhaldandi starvssetan, verður álagt setanarmyndugleikunum at lata ergoterapeutinum endurgjald, sum nevndin ásetir; fyrst endurgjald eftir, hvussu leingið ergoterapeuturin hevur verið í starvi, og síðani endurgjald eftir vanligum endurgjaldsreglum fyri mista inntøku, tá ið endurgjaldið fyri starvsstíð ikki er roknað við. Nevndin ger av, hvør ið skal rinda útreiðslurnar av nevndararbeiðinum.

**Tímaløntir ergoterapeutar (§§ 21 – 23)**

**§ 21 Tímaløn**

Ergoterapeutur, sum í meðal arbeiðir minni enn 15 tímar um vikuna, kann verða løntur við tímaløn. Tímalønin verður roknað í dagtænastu sum 1/2080 og í kvøld- og náttartænastu sum 1/1924 partur av nettoárslønini eftir starvsaldri.

*Stk. 2.* Er ikki annað avrátt, hava tímaløntir rætt til at verða avroknað eina ferð um mánaðin. Kann lønin ikki útgjaldast í arbeiðstíðini, ella beint sum arbeiðstíðin byrjar ella endar, kann tann tímalønti fáa lønina sendandi. Tilskilað skal vera, hvat ið lønin er fyri.

**§ 22 Starvsaldur**

Tá ið ergoterapeutur verður settur í tímalønt starv, verður starvsaldurin roknaður eftir somu reglum sum hjá mánaðarløntum ergoterapeutum. Um ergoterapeutur kann prógva minst 705 tíma arbeiði í einum almanakkaári uttan at hava verið í føstum starvi, verður starvsaldur roknaður. Starvssetan minst 15 tímar um vikuna telur við sum fullur starvsaldur.

**§ 23 Arbeiðstíð**
Í samband við
§ 10, stk. 1: Arbeiðstíð,
§ 10, stk. 2: Yvirtíð,
§ 10, stk. 7: Sunnudagsarbeiði,
§ 10, stk. 8: Eykaviðbót fyri arbeiði leygardag og mánadag,
§ 10, stk. 9: Eykaviðbót fyri tænastu millum kl. 17.00 og 06.00 og
§ 11: Tilkallivakt
galda somu reglur fyri tímalønt sum fyri mánaðarlønt.
*Stk. 2.* Tímalønt, sum hava arbeitt í 6 fylgjandi dagar (íroknað teir frídagar, sum eru fastlagdir sambært § 24, stk. 4) undan og í sambandi við ein fastan frídag, hava fyri fastar frídagar rætt til partvíst vanliga løn fyri teir tímarnar, sum arbeitt verður, og partvíst samsýning um tíman roknað á sama grundarlagi sum mánaðarlønt fáa í samsýning fyri mistar frídagar, sambært § 10, stk. 4. Tímalønt, sum hava minni enn 6 arbeiðsdagar beint undan føstum frídegi, hava rætt til frammanfyri nevndu samsýning, sí stk. 2, um tíman. Sama er galdandi fyri yvirtíð.
*Stk. 3.* Er tímatal avrátt við ergoterapeut, og stovnurin ikki hevur nóg mikið av arbeiði til hetta starvsfólk, hevur tann tímalønti -um ikki stovnurin hevur boðað starvsfólkinum frá í seinasta lagi 4 tímar, áðrenn arbeiðið átti at byrja - rætt til løn fyri teir tímarnar, sum avrátt varð, at starvsfólkið skuldi arbeiða henda dagin.

**§ 24 Uppsøgn, sjúka, frítíð o.a.**
Tímalønt kunnu sigast upp við eini freist, sum verður roknað soleiðis: Fyri hvørjar fullar 14 arbeiðsdagar, arbeitt er, er uppsagnarfreistin 1 dagur.
*Stk. 2.* Tann tímalønti ergoterapeuturin kemur undir galdandi lóg um dagpening í sambandi við sjúku og barnsburð.

*Stk. 3.* Tímalønt, sum verða biðin til tíðaravmarkað arbeiði og gerast sjúk, áðrenn arbeiðið byrjar, hava somu rættindi sum fastlønt, sambært § 14.
*Stk. 4.* Tímalønt hava rætt og skyldu til eitt frísamdøgur uttan løn fyri hvørjar seks fylgjandi dagar, ið arbeitt er. Frísamdøgrini kunnu tó flytast, er tørvur á tí á stovninum/arbeiðsplássinum.
*Stk. 5.* Tímalønt fáa frítíð sambært løgtingslóg frá 1. apríl 1986 við seinni broytingum. Frítíðarlønin verður 12% av skattskyldugu inntøkuni almanakkaárið fyri.

**§ 25 Ferðaútreiðslur**
Ferðaútreiðslur í sambandi við avloysarastørv:
Til avloysarastørv í 8 mánaðir og styttri rinda setanarmyndugleikarnir ferðaútreiðslurnar.

Ferðaútreiðslur í sambandi við dagliga arbeiðið og tænastuferðir:
Ergoterapeutur, settur eftir hesum sáttmála, hevur rætt at fáa goldnar ferðaútreiðslur, dag- og tímapening og endurgjald fyri nýtslu av egnum akfari í tænastuørindum eftir reglunum hjá Fíggjarmálaráðnum, sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelag Landsins.

Flutningsútreiðslur í sambandi við vaktir:
Ergoterapeutur, sum hevur tilkalli- og samdøgurvakt heimanífrá og sum verður boðsend, fær frían flutning til og frá tænastustaðnum. Fyri nýtslu av egnum akfari í sambandi við tilkalli- og samdøgursvakt heimanífrá, fær ergoterapeuturin samsýning sambært reglugerð hjá Fíggjarmálaráðnum, vísandi til protokollat nr. 4 frá 26.03.90.

**§ 26 Frálæra v.m.**
Ergoterapeutar hava rætt til serliga løn fyri frálæru til næmingabólkar eftir hesum reglum:

1) Liggur fyrireiking og frálæra í arbeiðstíðini, fæst einki endurgjald.
2) Liggur frálæra í vanligari arbeiðstíð, og fyrireiking uttan fyri arbeiðstíð, verður endurgoldin hálv tímaløn fyri ta tíð, frálæran varir.
3) Liggur frálæra eftir arbeiðstíð, verður endurgoldið fyri teir tímar, frálæran varir.
4) Fyri hvørjar seks stílar ella uppgávur, sum verða rættaðir, verður goldin ein frálærutími.

*Stk. 2.* Goldin verður tímaløn 215,28 kr. umframt 12% í frítíðarløn.
*Stk. 3.* Fyri frálæru til ergoterapeutar er tímalønin 418,27 kr. umframt 12% í frítíðarløn.
*Stk. 4.* Fyri frálæru til aðrar fakbólkar, verða goldnar 341,02 kr. um tíman umframt 12% í frítíðarløn.
*Stk. 5.* Frálæra, ið verður givin um kvøldið, t.e. aftaná kl. 17.00, verður samsýnd eftir § 26, stk. 1-4, umframt eitt ískoyti uppá 20%.
*Stk. 6.* Tá ið ergoterapeutar halda fyrilestur er lønin 1.048,39 kr. fyri tann fyrsta tíman og 440,10 kr. fyri hvønn fylgjandi tíma.

**§ 27 Álitisfólkaskipan**
Á arbeiðsplássi, har ið minst 3 ergoterapeutar arbeiða, hava teir rætt at velja eitt álitisfólk og varaálitisfólk. Allar reglur um álitisfólk eru somuleiðis galdandi fyri varaálitisfólk.
*Stk. 2.* Ergoterapeutar í leiðandi starvi kunnu tó ikki veljast til álitisfólk.

*Stk. 3.* Álitisfólkið hevur skyldu at ansa eftir, at lógir, sáttmálar, fyriskipanir o.a., sum eru galdandi fyri arbeiðsplássið/stovnin, sum heild verða hildin.
*Stk. 4.* Álitisfólkið hevur rætt og skyldu at tingast við deildar- og stovnsleiðsluna um øll mál, sum Ergoterapeutfelagið og starvsfólk felagsins á arbeiðsplássinum/stovninum áleggja álitisfólkinum.
*Stk. 5.* Eru álitisfólk og starvsfólk ikki nøgd við avgerð leiðslunnar eftir samráðingar, skal málið leggjast fyri Ergoterapeutfelagið.
*Stk. 6.* Tá ið talan er um at seta ella siga upp starvsfólk, skal leiðslan samráðast við álitisfólkið á arbeiðsplássinum/stovninum. Semjast partarnir ikki, skal málið fyri Ergoterapeutfelagið.
*Stk. 7.* Álitisfólkið skal - í samráð við stovnin - í arbeiðstíðini hava møguleika at taka sær av málum, sum viðvíkja starvsfeløgum ella arbeiðsviðurskiftum á stovninum/arbeiðsplássinum.
*Stk. 8.* Verður ergoterapeutur valdur í nevndina fyri Ergoterapeutfelagið, hevur starvsfólkið rætt til frí við løn at gera felagsarbeiði í arbeiðstíðini, tó soleiðis at tað ikki darvar arbeiðsgongdini á staðnum. Tá álitisfólk/nevndarlimur er burtur frá arbeiði vegna álitismanna/felagsarbeiði og játtað er frí við løn, verður bara givið frí við løn fyri ta tíð, viðkomandi skuldi havt verið til arbeiðis.
*Stk. 9.* Verður álitisfólk/varaálitisfólk/nevndarlimur sagt upp, skulu Ergoterapeutfelagið og Fíggjarmálaráðið viðgera málið. Við uppsøgnini skal fylgja nágreinilig grundgeving fyri at siga álitisfólkinum/varaálitisfólkinum/nevndarliminum upp. Henda grundgeving er grundarlagið fyri málsviðgerðini hjá Ergoterapeutfelagnum og Fíggjarmálaráðnum. Metir felagið uppsøgnina ov illa grundaða, skal álitisfólkið halda fram í starvi sínum og sum álitisfólk. Uppsagnarfreistin hjá álitisfólkum verður longd við 3 mánaðum.
Reglurnar í álitismannaskipanini eru galdandi í tvey ár frá tí at viðkomandi er farin frá sum ávíkavist álitisfólk, varaálitisfólk ella nevndarlimur.
*Stk. 10.* Álitisfólkaval fer fram í septembur mánaði ómakaár, og felagið boðar avvarðandi stovni/arbeiðsplássi frá, hvørji eru vald til álitisfólk.

*Stk. 11.* Álitisfólk og nevndarlimir í felagnum hava rætt til tænastufrí við løn at luttaka á álitisfólkaskeiði.

**§ 28 Samstarvsráð**
Á øllum almennum stovnum verður sett á stovn eitt samstarvsráð, har umboð fyri leiðslu, álitisfólk og varaálitisfólk sita. Samstarvsráðið skal hava innlit í øll mál stovninum viðvíkjandi, og verða avgerðir ikki tiknar, fyrrenn samstarvsráðið hevur gjørt sítt tilmæli.
*Stk. 2.* Settur verður 4 manna bólkur við 2 umboðum valdum av yrkisfeløgunum og 2 valdum av landsstýrinum at gera uppskot til reglugerð fyri virkið hjá samstarvsráðnum.

**§ 29 Gildi og Uppsøgn**
Hesin sáttmáli kemur í gildi tann 1. oktober 2017.
*Stk. 2.* Báðir partar hava rætt at siga sáttmálan upp at fara úr gildi við 3 mánaða ávaring, tó í fyrsta lagi 1. oktober í 2020.
Tá ið uppsøgnin av sáttmálanum fær gildi, og til nýggjur sáttmáli tekur við, verða ergoterapeutar fyribils løntir eftir teirri avtalu, sum var í gildi síðsta dag, ið sáttmálin galt.

*Í Tinganesi 28. januar 2022*

Fíggjarmálaráðið Ergoterapeutfelagið

## Avtala um eitt gott og mennandi arbeiðsumhvørvi

Fíggjarmálaráðið og Ergoterapeutfelagið (hereftir partarnir) staðfesta, at eitt gott arbeiðsumhvørvi og eitt álitisríkt samstarv er avgerandi fyri, at starvsfólk og leiðsla trívast. Hetta er tí eisini avgerandi fyri góðskuna tá arbeiðsuppgávur verða loystar, og fyri produktivitetin á arbeiðsplássinum. Partarnir vilja í samstarvi seta fokus á, at stimbra eitt gott arbeiðsumhvørvi – herundir eisini sálarliga arbeiðsumhvørvið.
Felags eyðkenni fyri arbeiðspláss við góðum arbeiðsumhvørvi er, at fylgjandi eyðkenni ganga aftur: Álit, sínámillum virðing og viðurkenning.
Fyritreytin fyri hesum er eitt gott samstarv og leypandi samskifti millum leiðslu og starvsfólk, her ímillum álitisfólk og trygdarumboð. Eisini er fyritreytin ein góð felags uppfatan av, hvør kósin er, hvørjar kjarnu arbeiðsuppgávurnar eru, innan hvørjar karmar hesar skulu loysast, og fatan av hvørjar væntanirnar eru til, hvussu arbeiðsuppgávurnar skulu loysast.
Fyri at tryggja eitt gott og mennandi arbeiðsumhvørvi, er týðandi, at øll á arbeiðsplássinum taka ábyrgd. Leiðslan, samstarvsnevnd, álitisfólk og starvsfólk mugu tí taka felags ábyrgd – bæði fyri, at tað gongur væl, og tá møguligir trupulleikar eru og skulu loysast.
Er arbeiðsumhvørvið ikki nóg gott – eitt nú sálarliga – kann hetta elva til størri sjúkrafráveru, mistrivna, at fólk fara úr starvi, og at arbeiðsuppgávur ikki verða loystar so væl sum møguligt.
Fyri at fyribyrgja hesum, hevur tað stóran týdning leypandi at halda eyga við arbeiðsumhvørvinum, og at taka fatur í og loysa trupulleikar, um tekin er um, at trupulleikar eru við arbeiðsumhvørvinum.
Fyri at kunna arbeiða málrættað við at tryggja eitt gott og mennandi arbeiðsumhvørvi krevst vitan um tey viðurskifti, sum ítøkiliga kunnu hava jaligan ella neiligan týdning fyri arbeiðsumhvørvið.
Partarnir eru samdir um, at stuðla átøkum, ið fremja eitt gott og mennandi arbeiðsumhvørvi.
Partarnir ásanna, at munur er á ymiskum arbeiðsplássum, arbeiðsuppgávum og starvsfólkum. Átøk mugu tí taka útgangsstøði í eini felags fatan av, at tey átøk, ið gera størstan mun eru tey, ið taka útgangsstøði í umstøðunum á ítøkiligu arbeiðsplássunum.
Fíggjarmálaráðið fer at kunna leiðslur og starvsfólk á landsins arbeiðsplássum um stóra týdningin av, at leiðsla og starvsfólk í felag tryggja eitt gott arbeiðsumhvørvi. Eisini fer Fíggjarmálaráðið í sáttmálatíðarskeiðnum at gera vegleiðing um, hvussu leiðslur og starvsfólk skulu fyrihalda seg, um starvsfólk eru strongd. Hartil fer Fíggjarmálaráðið í næstum at seta í verk vegleiðing um sjúkrafráveru. Vegleiðingarnar verða gjørdar í samráð við fakfeløgini.

**Førleikamenning**

Sáttmálapartarnir eru samdir um, at tað er alneyðugt, at ásetingin í sáttmálanum okkara millum um strategiska førleikamenning skal fáast at virka á øllum stovnum landsins.

Tað er av alstórum týdningi fyri menningina av almennu fyrisitingini og fyri at verða ein áhugaverdur arbeiðsmarknaður, at stovnarnir regluliga og áhaldandi stinga út í kortið, leggja ætlanir og førleikamenna starvsfólk samsvarandi. Hetta fyri at kunna taka við nýggjum avbjóðingum, so tænastustøðið alsamt verður betrað.

Regluliga eftirmeta sáttmálapartarnir, um ásetingarnar um strategiska førleikamenning í sáttmálanum verða fylgdar, í minsta lagi annað hvørt ár.

Á arbeiðsplássinum eru álitisfólkini bindiliðið millum leiðslu og starvsfólk og hava regluliga uppfylging við leiðsluna, um at strategiska førleikamenningin virkar eftir æltan.

## Avtala um fráboðanarform og fráboðanarfreist undan arbeiðssteðgi

## millum

## Fíggjarmálaráðið og Ergoterapeutfelagið

Partarnir í sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Ergoterapeutfelagið viðurkenna rættin hjá hvørjum øðrum at lýsa og at seta í verk arbeiðssteðg eftir ásetingnum niðanfyri.

Stk. 2. Fráboðan um arbeiðssteðg, eisini samhugaarbeiðssteðg, skal vera skrivlig og latin mótpartinum minst 48 tímar undan arbeiðssteðginum.

Stk. 3. Fráboðanin skal greitt siga frá, hvønn arbeiðssteðg, talan er um, og hvussu víðfevndur arbeiðssteðgurin er.

Stk. 4. Arbeiðssteðgur kann ikki verða fráboðaður, meðan sáttmálin er í gildi. Er sáttmálin farin úr gildi, kann arbeiðssteðgur ikki verða fráboðaður, fyrr enn samráðingar um nýggjan sáttmála eru endaðar. Er Semingsstovnurin komin uppí, ella er Semingsstovnurin boðsendur, eru samráðingarnar at meta sum endaðar, tá ið semingsstovnurin er givin við semingsroyndini, og hevur boðað frá tí.

Stk. 5. Hendan avtalan kann verða søgd upp saman við sáttmálanum partanna millum, við somu freist og fráboðan. Avtalan kann tó bara verða ógildað við nýggjari avtalu.

Stk. 6. Hendan avtalan fær gildi frá 1. oktober í 2016.

Í Tinganesi 10. november 2016

Fíggjarmálaráðið                                        Ergoterapeutfelagið

**Avtala um tiltøk, ið kunnu stuðla undir ein virknan starvsfólkapolitikk á landsins stovnum.**

**1. Inngangur**

Tað er týdningarmikið, at starvsfólkið hevur møguleika fyri persónligari menning, og neyðugt er samstundis at taka atlit at sambandið millum arbeiðslív og onnur lívsviðurskifti. Partarnir eru tí samdir um, at styrkja teir møguleikar, ið stovnarnir hava, tá ið teir evna sín starvsfólkapolitikk á hesum økjum:

- Førleikamenning
- Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á landsins stovnum
- Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á landsins stovnum
- Javnstøða

Harafturat eiga rættindi hjá starvsfólkum at verða vird, verður virksemi hjá landinum lagt til onnur at reka.

**2. Førleikamenning**

Leiðslur og starvsfólk eru týdningarmesta tilfeingið hjá landsins stovnum. Tað er tað arbeiði, sum tey í landsins tænastu inna, sum ger av, um úrslitini verða góð. Framhaldandi at menna starvsfólkini er tí umráðandi fyritreyt fyri, at landsins stovnar mennast.
Partarnir eru tí samdir um, at:

- miðvís og dagførd eftir- og víðariútbúgving av starvsfólkinum er ein fyritreyt fyri virkisfýsnum almennum stovnum við høgum tænastustigi.
- hvør stovnur sær skal virka fyri, at starvsfólkinum stendur í boði at kunna menna sín førleika bæði gjøgnum sítt dagliga yrki og við eftir- og víðariútbúgving. Til tess at røkka hesum endamáli, eigur hvør stovnur at seta sær miðvís menningarmál.
- endamálið við hesi avtalu er at geva starvsfólkinum umstøður at menna seg sjálvt og síðani møguleikar, at átaka sær virknari leiklut at mynda virki stovnsins. Harumframt ber til hjá leiðsluni at menna almenna tænastuførleikan.
- starvsfólk og leiðsla hava í felag ábyrgdina av førleikamenningini. Uppgávan hjá stovninum er at bera so í bandi, at starvsfólkini altíð eru skikkað til uppgávuna.
- Sáttmálapartarnir seta ein arbeiðsbólk, sum í sáttmálaskeiðnum skal tilevna eina vegleiðing um eina skipaða útbúgvingarætlan til starvsfólk á landsins stovnum.

**3. Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á landsins stovnum**

Fyri at varðveita eldri starvsfólk og fakligu vitan teirra á arbeiðsmarknaðinum, eru partarnir samdir um, at sum liður í eldrapolitikkinum á einstaka stovninum eigur at bera til at gera skipanir til starvsfólk, sum eru 60 ár og eldri – um so er, at tey sjálvi vilja tað, og umstøðurnar á arbeiðsplássinum annars eru til tess – at leggja síni eldru ár á arbeiðsmarknaðinum soleiðis til rættis, at tey fáa eina liðiliga tillagingarskipan, áðrenn tey fara úr starvi.
Tá ið stovnar evna sín eldrapolitikk, kunnu teir sum part í hesum gera sjálvbodnar skipanir, í hesum karmi:

**Niðursett tíð**
Hesar treytir skulu verða loknar, so at starvsfólk skal kunna koma undir skipanina:

- vera fylt 60 ár
- hava starvast hjá landinum seinastu 10 árini
- arbeiðstíðin skal vera minst 20 tímar um vikuna, eftir tað, at hon er niðursett

Starvsfólk kann fara uppí ¼ niður í starvstíð við lutfalsliga at fara niður í løn.
Stovnurin kann í hesum tíðarskeiðinum gjalda eftirlønargjaldið, sum um starvstíðin var ikki sett niður.

**Niðursett tíð orsakað av sparingum**
Gera sparingar, at starvsfólk verður sett niður í tíð, varðveitir starvsfólkið eftirlønargjaldið, sum um starvstíðin varð ikki sett niður. Treytirnar eru:

- starvsfólkið hevur fylt 55 ár
- starvsfólkið hevur starvast hjá landinum seinastu 10 árini
- arbeiðstíðin er minst ½ tíð, eftir at hon er niðursett.

**Lægri starv**
Stovnur kann eftir umsókn játta starvsfólki, ið hevur fylt 55 ár, at fara í annað lægri starv, um so er, at starvsfólkið seinastu 10 árini hevur starvast fulla tíð hjá landinum í einum starvi við leiðsluábyrgd ella í øðrum serliga krevjandi starvi.
Lønin verður tá samsvarandi lægra starvinum, men starvsfólkið fær framvegis heilt ella lutvíst eftirlønargjaldið í hægra starvinum, fyri eitt tíðarskeið, sum í mesta lagi má vera 7 ár.
Stovnurin kann veita eitt ikki eftirlønargevandi ískoyti, sum í mesta lagi kann vera munurin millum lønina í lægra flokkinum og lønina í hægra flokkinum. Ískoytið kann í mesta lagi verða veitt í 3 ár.

**4. Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á landsins stovnum**
Tá ið lagt verður til rættis, eiga bæði starvsfólk og leiðsla at vísa lagaligheit og smidleika, fyri at betri samanhangur kann verða millum familjulív og arbeiðslív.
Í teimum førum, tá ið børn verða innløgd á sjúkrahús, og lækni sigur tað vera neyðugt, at annað av foreldrunum verður innlagt við, kann starvsfólkið, loyva arbeiðsumstøðurnar tí, brúka dagarar, ið starvsfólkið eigur til frí við løn, tá ið barn/børn teirra eru sjúk, samanhangandi longur enn 2 dagar.

**5. Javnstøða**
Lønarskipanin eigur at verða so mikið greið, at hon gevur betri trygd fyri, at javnstøða er millum kynini, tá ið lønin verður ásett.

**6. Umleggja alment virksemi**
Um so er, at virksemi hjá landinum verður yvirtikið av øðrum at reka, eiga tær avtalur, rættindi og skyldur, landið hevur mótvegis starvsfólkunum, tá ið umskipanin fer fram, óskerdar at verða førdar yvir á tann, sum yvirtekur virksemið.

**Avtala um strategiska og skipaða førleikamenning á stovnum landsins**

**§ 1. Inngangur**
Skulu uppgávurnar hjá stovnum landsins verða røktar á munadyggan hátt við neyðugari dygd og framhaldandi menning, er sera týðandi, at førleikarnir hjá starvsfólkunum verða áhaldandi røktir og mentir.
*Stk. 2.* Partarnir halda tað vera avgerandi, at starvsfólk hjá landinum fáa møguleika at menna sín førleika, bæði í dagliga arbeiðnum og við eftirútbúgving og víðari útbúging. Fyri at fremja førleikamenningina eiga leiðslur og starvsfólk í felag at hava sum mál at stovna felags læruumhvørvi og at leggja til rættis eina smidliga tilgongd fyri førleikamenningini. Partarnir eru samdir um, at strategisk mál fyri menningini skulu verða gjørd fyri øll starvsfólk.

**§ 2. Øki**
Avtalan er galdandi fyri starvsfólk, sum eru fevnd av sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og felag, ið hevur undirskrivað hesa avtalu.

**§ 3. Endamál**
Endamálið við avtaluni er at binda leiðslu og starvsfólk til at leggja stóran dent á førleikamenningina, og báðir partar hava ábyrgd av at tryggja, at førleikamenningin styrkist. Hetta skal nøkta tørvin á fakligari menning hjá einstaka stovninum og einstaka starvsfólkinum.

**§ 4. Menningarmál**
Fyri hvørt einstakt starvsfólk á øllum stovnum hjá landinum verður gjørd ein skipað førleikamenningarætlan, ið skal taka atlit at málunum hjá tí einstaka stovninum.
*Stk. 2.* Árliga er samrøða millum leiðsluna og starvsfólkið, har ítøkilig menningarmál fyri einstaka starvsfólkið verða fest á blað í semju við starvsfólkið. Í starvsfólkasamrøðuni verður eisini viðgjørt um og hvussu, starvsfólkið hevur nátt málunum, ið sett vórðu í síðstu starvsfólkasamrøðu.
*Stk 3.* Útbúgving og annað menningarvirksemi fer vanliga fram í arbeiðstíðini. Arbeiðsgevarin rindar, jb. stk. 2, útreiðslur av útbúgving.
*Stk. 4.* Leiðsla og starvsfólk hava felags ábyrgd av, at menningarmálini verða rokkin. Leiðslan tryggjar karmar og treytir fyri førleikamenning, og starvsfólkið arbeiðir fram móti avtalaðu menningarmálunum.

**§ 5. Almennur førleiki**
Dagførdur grundleggjandi skúlakunnleiki kann verða treytin fyri at røkja og menna fakliga førleikan. Bæði einstaki stovnurin og einstaka starvsfólkið hava ábyrgd av at virka fyri, at almennur førleiki er partur av førleikamenningini.

**§ 6. Leiklutur hjá leiðslu, starvsfólki og samstarvsnevnd**
Leiðsla og starvsfólk skulu í felag, grundað á strategisku málini hjá stovninum og tørvinum á strategiskari førleikamenning:

- áseta grundreglur og leiðreglur fyri førleikamenningartiltøkunum á stovninum
- samráðast um grundreglurnar fyri og tørvin á eftirútbúgving fyri allar starvsfólkabólkar
- áseta leiðreglur fyri, hvussu starvsfólkasamrøður skulu verða skipaðar

*Stk. 2.* Leiðsla og starvsfólk eftirmeta í felag eina ferð árliga førleikamenningartiltøkini á stovninum.
*Stk. 3.* Uppgávurnar í stk. 1 og 2 røkir samstarvsnevndin, um stovnurin hevur eina slíka. Biður annar parturin um tað, verður ein menningarnevnd vald undir samstarvsnevndini.

**§ 7. Fylgibólkur**
Ein fylgibólkur verður settur við umboðum fyri Fíggjarmálaráðið og tey feløg, sum hava undirskrivað hesa avtalu.

**§ 8. At seta í gildi og siga upp**
Henda avtala verður sett í gildi tann 1. oktober 2003. Avtalan kann skrivliga verða søgd upp við 3 mánaða ávaring til ein 1. í mánaðinum, tó í fyrsta lagi tann 1. oktober 2005.

## Avtala um serstaka fríviku

**Øki**
**§ 1.** Avtalan er galdandi fyri mánaðarlønt starvsfólk.
*Stk. 2.* Avtalan er eisini galdandi fyri tímalønt, sum eru í starvi í meiri enn 3 mánaðir.

**Hvussu frívikan verður innvunnin og hildin**
**§ 2.** Aftur at frítíðini eftir frítíðarlógini, vinnur starvsfólk eina sertaka fríviku um árið. Vunnir verða 0,42 serstakar frídagar við løn fyri hvønn mánað í starvi (5 daga vika). Serstøku frídagarnar verða vunnir samsvarandi setanarbrøkinum.
*Stk. 2.* Serstaka frívikan verður innvunnin og hildin í frítíðarárinum, á sama hátt sum frítíð eftir frítíðarlógini.

**§ 3.** Setanarmyndugleikin og tann setti avtala, nær í frítíðarárinum serstaka frívikan verður hildin. Hon verður løgd í samráð við starvsfólkið, tá ið arbeiðsgongdin loyvir tí. Starvsfólkið skal boða frá so tíðliga sum til ber, nær ætlanin er at halda frívikuna.
*Stk. 2* Frídagarnir kunnu verða hildnir hvør sær, eisini sum hálvir dagar.

**§ 4.** Setanarmyndugleikin og starvsfólkið kunnu í staðin avtala, áðrenn frítíðarárið byrjar, at serstaka frívikan ella partur av henni verður ikki hildin, men útgoldin, tá ið frítíðarárið er av, jb. § 7. Er semja um tað, kann slík avtala eisini verða gjørd í frítíðarárinum.

**§ 5.** Setanarmyndugleikin og starvsfólkið kunnu eisini avtala, at serstaka frívikan ella partur av henni, sum er ikki hildin, tá ið frítíðarárið er av, verður flutt at halda í seinri frítíðarári.
*Stk. 2.* Avtalan skal vera skrivlig og avtalað skal eisini verða, nær fluttu dagarnir skulu verða hildnir.
*Stk. 3.* Verður avtala ikki gjørd sambært stk. 1, verða serstøku frídagarnir útgoldnir, tá ið frítíðarárið er av, jb. § 7.

**§ 6.** Fer starvsfólk úr starvi, og hevur ikki hildið serligu frívikuna ella part av henni, verður hon útgoldin, jb. §7.

**§ 7.** Útgjaldið fyri serstakan frídag er ½% av vunnari løn í undanfarna innvinningarári.
Í útrokningini verður ikki tald við løn, sum er útgoldin í frítíðini, veitt frítíðarløn ella útgoldið frítíðarískoyti.

**Gildiskoma og skiftisreglur**
**§ 8.** Avtalan hevur gildi frá 1. oktober 2003.

**§ 9.** Starvsfólk, sum er í starvi alt innvinningarárið 2003/2004, tvs. frá 1. apríl 2003 til 31. mars 2004, hevur rætt til 5 serstakar frídagar í frítíðarárinum, sum byrjar 2. mai 2004. Hevur starvsfólkið verið í starvi minni enn alt innvinningarárið, verða serligu frídagarnir lækkaðir samsvarandi.

**§ 10.** Sáttmálafrídagarnir fella burtur 1. januar 2004.

**Protokollat nr. 2 viðvíkjandi skeiði**

Føroyskir Fysioterapeutar, Føroyskir Ergoterapeutar og Føroyskir Sjúkrahúslaborantar og Føroya Landsstýri eru samd um, at fyrr galdandi praksis/kutyma viðv. skeiðvirksemi heldur á fram.

Tórshavn tann 26/3-1990

Føroya Landsstýri:
*Jógvan Sundstein, sign.*
*Súsanna Danielsen, sign.*

Føroyskir Fysioterapeutar:
*Karin Djurhuus, sign.*

Føroyskir Ergoterapeutar
*Hanna á Reynatúgvu, sign.*

Føroyskir Sjúkrahúslaborantar
*Katrina M. Johannesen, sign.*

**Protokollat nr. 3 viðvíkjandi bústaði**

Føroyskir Fysioterapeutar, Føroyskir Ergoterapeutar, Føroyskir Sjúkrahúslaborantar og Økonomafelag Føroya og Føroya Landsstýri eru samd um, at íbúð til vikarar og avloysarar so vítt gjørligt er til taks í sambandi við avloysarastørv.

Annars hevur arbeiðsgevarin ikki skyldu til at útvega bústað til starvsfólkið.

Um íbúðir verða útleigaðar fyrstu ferð av stovninum, verður leigan ásett av samráðingarpørtunum.

Tórshavn tann 25/3-1990

Føroya Landsstýri:
*Jógvan Sundstein, sign.*
*Súsanna Danielsen, sign.*

Føroyskir Fysioterapeutar:
*Karin Djurhuus, sign.*

Føroyskir Ergoterapeutar
*Hanna á Reynatúgvu, sign.*

Føroyskir Sjúkrahúslaborantar
*Katrina M. Johannesen, sign.*

Økonomafelag Føroya
*Mariann Patursson, sign.*

**Protokollat nr. 4 viðvíkjandi nýtslu av egnum akfari í sambandi við tilkallivakt**
Føroyskir Fysioterapeutar, Føroyskir Ergoterapeutar og Føroyskir Sjúkrahúslaborantar og Føroya Landsstýri eru samd um, at fyri nýtslu av egnum akfari í sambandi við tilkalli- og samdøgursvakt heimanífrá verður givin ein samsýning, sum samsvarar við hálvum hýruvognstaksti.

Tórshavn tann 26/3-1990

Føroya Landsstýri:
*Jógvan Sundstein, sign.*
*Súsanna Danielsen, sign.*

Føroyskir Fysioterapeutar:
*Karin Djurhuus, sign.*

Føroyskir Ergoterapeutar
*Hanna á Reynatúgvu, sign.*

Føroyskir Sjúkrahúslaborantar
*Katrina M. Johannesen, sign.*

**Protokollat nr. 5 viðvíkjandi kvalifikatiónskrøvum**
Partarnir eru samdir um, at miðast skal ímóti, at tá størv sum sjúkrahúslaborantar, økonomaassistentur v.m., ergoterapeutar og fysioterapeutar verða lýst leys at seta, verða tey sett við fólki, sum lúka kvalifikatiónskrøvini. Um so er, at hetta ikki letur seg gera, og fólk, sum ikki lúka kvalifikatiónskrøvini, verða sett í starvið, skal avvarðandi yrkisfelag verða kunnað um setanina og hava frágreiðing um, hví viðkomandi er settur.

Tórshavn, tann 20/10-91

Føroya Landsstýri:
*Atli P. Dam, sign.*
*Súsanna Danielsen, sign.*

Tórshavn, tann 4/11-91

Føroyskir Sjúkrahúslaborantar
*Katrina M. Johannesen, sign.*

Økonomafelag Føroya
*Mariann Patursson, sign.*

Føroyskir Ergoterapeutar
*Hanna á Reynatúgvu, sign.*

Føroyskir Fysioterapeutar:
*Karin Djurhuus, sign.*

**Protokollat nr 6**
Partarnir vilja í sáttmálaskeiðnum hyggja nærri at, um tað ber til at gera sáttmála, har miðað verður eftir:
- betri skipaðum og greiðari viðurskiftum
- einfaldari og liðiligari sáttmála

Tórshavn, tann 8. apríl 1999

| | |
|---|---|
| Fyri Fíggjarmálastýrið | Fyri Føroyskar Ergoterapeutar |
| *Karsten Hansen, sign.* | *Hanna á Reynatúgvu, sign.* |
| *Thomas Magnussen, sign.* | |

**Protokollat**
Partarnir binda seg til í sáttmálaskeiðnum at orða krøv til eina leiðaraútbúgving, ið skal kunna geva eina leiðaraviðbót. Feløgini koma við uppskoti.

Argir, tann 14. november í 2003